





Robin Gibb á Summar Festivalin:

# - ein tann størsta hendingin nakrantíð

*Robin Gibb verður maðurin aftan eitt minniligt fríggjakvøld á Vágsbøi komandi vikuskiftið*

**Við meira enn 200 milliónum seldum fløgum telist Bee Gees millum mest seljandi bólkarnar í tónleikasøguni, og teirra sangskattur verður mettur sum tann næststørsti í poppsøguni – bert tikin av The Beatles. Á Summar Festivalinum fer Bee Gees-sangarin Robin Gibb at bjóða eitt heilt serligt kvøld við øllum teim kendu løgunum hjá bólkinum.**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Á Summar Festivalinum fer Bee Gees-legendan Robin Gibb at syngja øll tey stóru hittini hjá Bee Gees saman við bólki, ið er bæði væl spældur og væl mannaður. Lagt verður upp til eina gandakenda konsert við nøkrum av størstu hittunum í poppsøgunum - sungin av manninum, sum hevur verið við til at skapt og sungið tey upprunaliga.

- At vit hava fingið Robin Gibb at spæla á Summar Festivalinum er ein tann største hendingin í søguni hjá okkara festivali. Hann er ein av høvuðsmonnunum úr einum av heimsins størstu tónleikabólkum nakrantíð og eitt ordans scoop fyri Summar Festivalin og føroyska tónleikasummarið, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum av Summar Festivalinum.

## Ovast í fimm áratíggindi

Robin Gibb er ein av trimum Gibb-beiggjum í bólkinum Bee Gees. Robin Gibb hevur sungið og skrivað sín part av Bee Gees-hittunum, sum hava selt meira enn 200 milliónir plátur kring heimin. Harafturat hava sangir hjá Bee Gees, sungnir av øðrum sangarum, selt milliónir av plátum.

Heili 60 sangir hjá teimum hava verið á hittlistum kring heimin, og hittini hjá Bee Gees eru eisini aktuell. Ein nýggj innspæling av sanginum "Islands In The Stream" hevur fyri stuttum ligið sum nummar 1 í Bretlandi, og tað hevur við sær, at Bee Gees hevur havt sangir ovast á bretska hitlistanum í fimm ártíggjund.

Bee Gees eru eisini millum fremstu bólkar í heiminum, tá tað kemur til sølu av tónleiki. Ein amerikanskur felagsskapur hevur gjørt upp, at bert Elvis Presley, The Beatles, Michael Jackson, Garth Brooks og Paul McCartney hava selt meira fløgur enn Bee Gees.

Bee Gees góvu sína fyrstu plátu út í 1965. Síðani kom ein røð av væl umtóktum útgávum, og síðst í 70'unum vóru Bee Gees so populerir, at teir eitt skifti høvdu 5 sangir millum 10 teir ovastu sangirnar á amerikanska single hitlistanum – eitt óhoyrt bragd.

## Eitt minniligt kvøld

Bee Gees góvu sína seinastu fløgu út í 2001, og tvey ár seinni gavst bólkurin at spæla, tá Maurice Gibb doyði brádliga. Síðani hava Robin og Barry Gibb tó verið virknir tónleikarar, og teir hava hvør í sínum lagi spælt konsertir við Bee Gees sangum.

Og nú kemur Robin Gibb kemur til Føroya at hava eina konsert – eitt minniligt kvøld – við øllum teimum størstu hittunum hjá Bee Gees. Summar Festivalurin er til reiðar at bjóða kanska mest legendarisku konsertina í Føroyum nakrantíð.

Um onkur av teim ungu festivalgestunum ikki halda seg kenna løgini hjá Bee Gees serliga væl, so ber til at fara inn á www.youtube.com og leita fram góðar tónar. Tit verða ikki vónsvikin, so tað er bara at fara í gongd.. ;)



## Túnatos

**Ragnhild hittir í dag Boga Andreasen. Bogi er klaksvíkingur, men hevur seinastu árini gjørt rættiliga um seg innan mentanarlívið - serliga í Havn, har hann eisini er varaborgarstjóri í dag.**

**1. Ætlar tú tær á SF í ár?**
*Sjálvandi fari eg á SF. Festivalurin er fyri alla familjuna og er í heimstaðnum.*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Brian McFadden. Framúr góð framførsla.*

**3. Svevur tú í tjald ella í ordiligari song, tá tú ert á SF?**
*Eg sovi í góðari song heima hjá svigermor – og fái drekka upp í songina, um eg ynski tað :)*

**4. Hvør hevur verið løgnasta uppliving, tú hevur havt á SF?**
*Tá 8000 fólk sungu við til sangirnar hjá Dynamit. Eg undrist, men tað var ein stuttlig konsert.*

**5. Hvønn kundi tú hugsað tær at hoyrt á SF 2010?**
*Michael Buble saman við Tórshavnar Big Band.*

# Bert 1000 vikuskiftispass eftir

**Í løtuni eru bert umleið 1000 vikuskiftispass eftir til Summar Festivalin. Tí ræður um at skunda sær, um tú ætlar tær uppliva øll tey stóru heimshittini, sum verða á skránni komandi vikuskiftið.**

FESTIVALUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Komandi vikuskiftið verður sætti Summar Festivalurin hildin, og lagt er upp til enn eitt festivalbrak í Klaksvík. Ongantíð áður hava fólk havt møguleikan at hoyra so nógv heimshitt á einum føroyskum palli, og við stóru Bee Gees stjørnuni Robin Gibb á odda, verður Summar Festivalurin aftur í ár festivalurin við teimum stóru nøvnunum.

Atgongumerkjasølan hevur gingið væl, og seinastu dagarnar hevur rættiligur gravgangur verið eftir atgongumerkjum til Summar Festvalinum.

Forsølan av vikuskftispassum er avmarkað, og í løtuni eru umleið 1000 vikuskiftispass eftir í forsøluni. Hesi kunnu keypast á Magn-støðum, í Telebúðum og á Teleshop.fo



SLÁIMASKINUR
IÐ SLÁA ALT
- 2+2 gear ella 6+2 gear (báðar vegir)
- Prísir frá kr. 16.350 til 31.000



Knívar í ymiskum støddum frá 71 til 148 cm

Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo